# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# 3XGregersen til NM



Einar, Heðin og Julian Gregersen úr Klaksvík vunnu sær allir rætt til at umboða Føroyar, tá norðurlendska meistaraheitið í talvi verður á skránni til várs
www.faroechess.com

**FM vinnararnir vórðu funnir um vikuskiftið, og nú er greitt, hvørji skulu umboða Føroyar í NM-kappingini komandi vár. Tríggir av luttakarunum eita Gregersen**

TALV
*Jógvan Joensen*
*jogvan@kallnet.fo*

Eysturskúlin var karmur um FM endabrakið í talvi fyri ung, sum varð telvað leygardagin. FM-finalurnar 2008 vórðu – sum væntað varð frammanundan - sera spennandi. Borðreitt varð við góðari telving og undirhaldi í serflokki. Fleiri nýggir spennandi telvarar.

Umframt at telvað varð um FM-heitið í 5 aldursbólkum, ráddi um í minsta lagi, at røkka 2. plássið í aldursbólkinum, tí harvið varð NM-luttøka í Føroyum í februar mánað 2009 – tryggjað. Ein "gularót" sum ár undan ári, ger FM finaluna til nakað heilt serligt.

IM Helgi Dam Ziska gjørdi sína skyldu í U20 bólkinum og vann FM heitið sannførandi. Hjalti Toftum Jógvansson var somuleiðis eirindaleysur við FM sigrinum í U16 bólkinum. Høgni Egilstoft Nielsen borðreiddi enn einaferð við telving í serflokki í U12 bólkinum - vann øll talvini. Tá avtornaði varð neyðugt við dupultum umdysti í U14 bólkinum um FM heitið og bronsuna, áðrenn steypini kundu handast. Pætur Poulsen vann samanumtikið trygt U14 bólkin. Julian Gregersen gjørdi bart í U10 bólkinum og vann FM-heitið. Sera spennandi umdystur varð neyðugur til tess at finna bronsuvinnaran í yngsta bólkinum.

### 3XGregersen

Heilt serligt bragd varð staðfest í Eysturskúlanum, leygardagin. Gregersen-brøðurnir úr Klaksvík megnaðu - ikki sørt sensationelt - allir at kvalifisera seg til NM 2009 ! Einar Gregersen nr. 2 í U14, Julian Gregersen FM vinnari U10 og Heðin Gregersen nr. 2 í U12. Einastandandi avrik ! Klaksvíkar Talvfelag er ávegis at grundfesta eina sera spennandi Talv-TRIO !

Samanlagt vunnu klaksvíkingar - aftur hesuferð - flest heiðursmerki. Triðingurin – 5 steyp - fóru norðurum: 1 Gull, 2 Silvur og 2 bronsusteyp. Hinvegin vann Havnin flest FM-heiti: 2 Gull, 1 Silvur og 1 Bronsu. Sandavágur vann 1 Gull og 2 Silvur, meðan Skopun vann 1 Gull og Vestmanna 2 bronsur.

NM hópurin er samansettur við 3 telvarum úr ávikavist Tórshavn, Klaksvík og Sandavági - umframt 1 telvara úr Skopunar Talvfelag.

NM-hópurin 2009, sum luttekur í februar mánað 2009 í Føroyum - ímóti 50 javnaldrum úr hinum Norðurlondunum, er hesin:

IM Helgi Dam Ziska, Margar Berg og Hjalti Toftum Jógvansson úr Tórshavn.

Rógvi Egilstoft Nielsen, Høgni Egilstoft Nielsen og Silas Eyðsteinsson úr Sandavági.

Einar Gregersen, Heðin Gregersen og Julian Gregersen úr Klaksvík.

Pætur Poulsen úr Skopun.

Silas Eyðsteinsson og Julian Gregersen eru nýggir í NM-høpi.

## FAKTA

**U20**
IM Helgi Dam Ziska, Tórshavn (4)
Margar Berg, Tórshavn (2½)
Rógvi Dragaberg, Klaksvík (2)
Vagnur Dam, Norðskáli (1½)
Borgar J. Stórá, Vestmanna (0)

**U16**
Hjalti Toftum Jógvansson, Tórshavn (5½)
Rógvi Egilstoft Nielsen, Sandavágur (4)
Rúni Vørmadal, Vestmanna (1½)
Heiðrikur Tindskarð Jacobsen, Tórshavn (1)

**U14**
Pætur Poulsen, Skopun (4½) + 2 í umdysti við
Einar Gregersen, Klaksvík (4½)
Sára Traber Olsen, Tórshavn (3½) + 3 í umdysti við
Johan Hentze, Norðskáli (3½) + 2 í umdysti við
Jóhann Vørmadal, Vestmanna (3½) + 1 í umdysti við 3. og 4.
Bárður Jónsson Stórá, Vestmanna (1)
Torkil Jespersen, Sandavágur (½)

**U12**
Høgni Egilstoft Nielsen, Sandavágur (7)
Heðin Gregersen, Klaksvík (5½)
Sjúrður Olsen, Vestmanna (4½)
Rúni Tindskarð Jacobsen (4)
Alfred Olsen, Vestmanna (3)
Leivur í Buð Justinussen, Árnafjørður (3)
Jákup á Rógvu, Vestmanna (1)
Magni J. Hansen, Hoyvík (0)

**U10**
Julian Gregersen, Klaksvík (6½)
Silas Eyðsteinsson (5½)
Janus Skaale (4½) + 2 í umdysti við
Magni Weihe, Sandavágur (4½)
Mikkjal Bjartalíð, Sandur (3)
Rói Johannesen, Kaldbak (2½)
Súsanna T. Jacobsen, Tórshavn (1)
Valborg T. Jacobsen, Tórshavn (½)

## Meinhardt Joensen til NSÍ

NSÍ kunngjørdi í kvøld, at felagið hevur gjørt sáttmála við føroyskan málmann, sum áður hevur spælt fyri KÍ, B68, GÍ og B36

Meinhardt Joensen hevur gjørt avtalu við NSÍ um næsta kappingarár.

Meinhardt kemur úr B36, har hann spældi í fjør, eftir at hann í nøkur ár hevði vart málið hjá barndómsfelagnum KÍ.

Meinhardt er 29 ára gamal og hevur umframt B36 og KÍ eisini spælt fyri B68 og GÍ.

- Á málmansplássinum er neyðugt við einum royndum manni, og nú Meinhardt er komin til felagið, metir venjarin at NSÍ er rættuliga væl fyri, á tí plássinum til komandi kappingarár, skrivar heimasíðan hjá NSÍ.

**-mørk**

## FSF móttøku fyri Jógvan Martini

Í september í ár boðaði Jógvan Martin Olsen frá, at hann gevst sum landsliðsvenjari.

Dysturin á útivølli móti Litava gjørdist hansara seinsta landsdystur í hesum umfarinum, og komandi ár verður tað í Víkingi, at hann fer at royna seg.

Fótbóltssabandið skipar í dag fyri móttøku, har høvið verður at siga landsliðsvenjaranum formliga farvæl, og verður móttøkan millum klokkan 15 og 16.30 í FSF-húsinum við Tórsvøll.

**-mørk**

## Nýggj sjónvarpsavtala

FSF boðaði í vikuni frá, at frá 2009 verður tað sveisiska felagið Kentaro, sum hevur sjónvarpsrættindini til føroysku landsdystirnar.

Avtalan er galdandi fyri komandi undankappingar um EM og HM.

Í hesum tíðarskeiðinum, frá 2010 til 2014, fær sveisiska fyritøkan rættin til at víðariselja sjónvarpsmyndirnar frá øllum heimadystum hjá føroysku landsliðunum. Í avtaluni er eisini rættindini til at selja lýsingar kring leikvøllin.

FSF-forsetin Høgni í Stórustovu sær fram til nýggja samstarvið við Kentaro:

- Kentaro er ein av undangongufyritøkunum innan sítt øki í heiminum, og eg ivist ikki í, at avtalan verður til gagns fyri føroyskan fótbólt, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti.

**-mørk**